## Claus legði upp til mál hjá Blackpool

Týskvøldið spældi Blackpool dyst í League 1, sum triðbesta enska fótbóltsdeildin eitur. Blackpool spældi á heimavøllinum Bloomfield Road ímóti Chesterfield, og dysturin endaði við javnleiki 1-1. Blackpool kom á odda eftir ein góðan hálvan tíma, tá fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen sendi bóltin inn í høvdið Simon Gillet, sum stútaði í málið. Í seinna hálvleiki javnaði Chesterfield. Claus var á vøllinum allar 90 minuttirnar. Blackpool liggur á 22. plássi í deildini, har 24 lið spæla við.



## 8 daga leikbann til Thatcher

Enska fótbóltssambandið hevur nú gjørt av, Ben Thatcher, sum spælir fyri Manchester City,s kal hava leikbann í átta dystir fyri at hava gjørt seg inn á ein spælara hjá Portsmouth. Í dystinum tann 23. august smekkaði Thatcher albogan í andlitið á Pedro Mendes, sum misti vitið og varð fluttur á sjúkrahúsið. Umframt teir 8 dystirnar, kann Thatcher fáa 15 dystir leikbann afturat, um hann fremur líknandi ágang næstu tvey árini. Thatcher biður um umbering fyri tilburðin og tekur ímóti revsingini.

# Málini regnaðu inn í Barcelona

**Champions League meistararnir vunnu stórsigur í fyrsta umfarinum av Champions League, meðan stjørusetta Inter-liðið tapti og fekk miðvallargeneralin útvístan**

CHAMPIONS LEAGUE
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Týskvøldið vóru fyrstu dystirnir í heimsins bestu fótbóltskapping fyri feløg spældir. Fremstu feløgini í Europa spíluðu seg út í Champions League, og fyri flestu av favorittunum gekk tað væl.

FC Barcelona vann kappingina seinast, og teir løgdu fyri sum eitt ódnarveður í regninum á Nou Camp. Levski Sofia var á vitjan, og bulgarska liðið fekk ikki eitt bein til jørðina.

Barcelona legði seg fram um í sjeynda minutti, og teir øktu einaferð áðrenn hálvleikssteðgin. Í seinna hálvleiki gjørdist munurin millum liðini meira eyðsýndur, og tríggjar ferðir afturat skoraði Barcelona, sum annars spældi gestirnar niður og norður við skjótum smáspæli.

Hini dysturin í bólki A varð spældur í London, og har vann Chelsea 2-0 á Werder Bremen. Annað málið gjørdi týski stórspælarni Michael Ballack.

Eftir dystin var venjarin hjá Chelsea, Jose Mourinho, illur um, at Chelsea fær so nógv gul kort í Champions League. Hann heldur, at spælarar sum John Terry og Frank Lampard, sum fáa fá gul kort í ensku kappingini, verða ov hart revsaðir í europeiskum dystum.

### Viera reytt kort

Í bólki B syrgdi Inter fyri mest óvæntaða úrslitinum, tá ið italska stórfelagið, sum hevur fingið fleiri nýggjar spælarar á liðið í summar, tapti 1-0 fyri Sporting Lissabon.

Inter gjørdi sjálvt støðuna hjá sær trupla, og tá ið fraklendingurin Patrick Viera fekk seinna gula kortið fyri eina ógvusliga takkling í seinna hálvleiki, reyk hann út og er nú leikbannaður.

Hin dysturin í bólkinum endaði við tryggum 4-0 sigri til Bayern Munchen ímóti Spartak Moskva. Fyri steðgin gekk ikki eftir vild hjá týska liðnum, men í seinna hálvleiki settur teir russiska liðið upp á pláss.

### Morientes glógvaði

Bólkur C endaði málleysur týskvøldið. Liverpool vitjaði í Endhoven, og har vóru fleiri av størstu stjørnunum hjá Liverpool settar á beinkin til dystin. Eingin Crouch og eingin Gerrard vóru á vøllinum frá byrjan. Liverpool kláraði eftir 3-0 tapið fyri Everton at halda málið reint hesaferð, og teir vóru um reppið at vinna, tá ið Gerrard smekkaði eitt skot á stongina í seinna hálvleiki.

Hin dysturin í bólkinum var millum Galatasaray og Bordeaux, og har kom heldur einki mál.



*Buldribassin hjá Barcelona, Carlos Puyol, tók sær av tí sindrinum, sum Levski Sofia kláraði at hótta við í Nou Camp týskvøldið. Barcelona vann dystin 5-0*

*Mynd: Scanpix*

Í bólki D gjørdi fyrrverandi Liverpool-álopsspælarin Fernando Morientes av álvara um seg, og hann skoraði trý mál, tá ið Valencia vann 4-2 á Olympiakos, og harafturat kláraði hann eisini at misnýta brotsspark.

Roma vísti stórspæl í seinna hálvleiki av dystinum ímóti Shakhtar Donetsk og skoraði fýra mál. Eitt av málunum gjørdi Francesco Totti, sum italiumenn vilja hava aftur á landsliðið.

## Champions League

**Olympiakos-Valencia 2-4 (1-2)**
1-0: Michalis Konstantinou, 28.
1-1: Fernando Morientes, 34.
1-2: Fernando Morientes, 39.
2-2: Nery Alberto Ouaddou, 66.
2-3: Raul Albiol, 85.
2-4: Fernando Morientes, 90.

**Roma-Shakhtar Donetsk 4-0 (0-0)**
1-0: Rodrigo Ferrante Taddei, 67.
2-0: Francesco Totti, 76.
3-0: Daniele De Rossi, 79.
4-0: David Pizarro, 89.

**Chelsea-Werder Bremen 2-0 (1-0)**
1-0: Mickael Essien, 24.
2-0. Michael Ballack, br., 68.

**Barcelona-Levski Sofia 5-0 (2-0)**
1-0: Andrés Iniesta, 7.
2-0: Ludovic Giuly, 39.
3-0. Carlos Puyol, 49.
4-0: Samuel Eto'o, 58.
5-0: Ronaldinho, 90.

**Sporting Lissabon-Inter 1-0 (0-0)**
1-0: Marco Antonio Caneira

**Bayern Munchen-Spartak Moskva 4-0 (0-0)**
1-0: Claudio Pizarro, 48.
2-0: Roque Santa Cruz, 52.
3-0: Bastian Schweinsteiger, 71.
4-0: Hasan Salihamidzic, 84.

**Galatasaray-Bordeaux 0-0**

**PSV-Liverpool 0-0**

**Olympiakos-Valencia 2-4 (1-2)**
1-0: Michalis Konstantinou, 28.
1-1: Fernando Morientes, 34.
1-2: Fernando Morientes, 39.
2-2: Nery Alberto Ouaddou, 66.
2-3: Raul Albiol, 85.
2-4: Fernando Morientes, 90.

**Roma-Shakhtar Donetsk 4-0 (0-0)**
1-0: Rodrigo Ferrante Taddei, 67.
2-0: Francesco Totti, 76.
3-0: Daniele De Rossi, 79.
4-0: David Pizarro, 89.

## NSÍ liggur best fyri

Leygardagin spæla dreingjaliðini hjá NSÍ og VB/TB avgerandi dyst um FM-heitið í Runavík. NSÍ liggur sum er best fyri í deildini, tí liðið er tvey stig frammanfyri suðuroyarliðið, nú tað mangla tríggir dystir av kappingini.

Kravið til VB/TB er tí, at liðið vinnur dystin í Runavík. NSÍ kann hinvegin loyva sær at spæla javnleik, og um liðið vinnur dystin, so er gullið so nær, sum tað kann verða undan tveimum teimum seinastu dystunum.

**Dreingir, Meistarabólkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. NSÍa | 7 | 37-9 | 21 |
| 2. VB/TBa | 7 | 30-10 | 19 |
| 3. B36a | 7 | 24-13 | 11 |
| 4. KÍa | 7 | 23-15 | 8 |
| 5. Skála | 7 | 5-18 | 6 |
| 6. EB/Str. | 7 | 8-62 | 4 |

## KÍ kann taka stórt fet

Farna vikuskiftið spældu HB og KÍ toppdyst í meistarabólkinum hjá smádreingjum. Dysturin, sum varð spældur í Havn, endaði við 2-0 sigri til KÍ, sum nú liggur fremst í smádreingjadeildini. Longu legyardagin kann KÍ taka eitt stórt fet afturat fram ímóti meistaraheitinum, tí tá vitjar triðfremsta liðið, TB, í Klaksvík.

Trý umfør eru eftir at spæla í smádreingjadeildini, og tað eru KÍ, HB og TB, sum stríðast um medaljuplássini. KÍ hevur munin í løtuni, men tey fremstu liðini hava avgerandi dystir eftir ímóti hvørjum øðrum, og tí er framvegis opið, hvør kann kann gerast føroyameistari.

**Smádreingir, Meistarabólkur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. KÍa | 7 | 27-7 | 20 |
| 2. HBa | 7 | 35-8 | 18 |
| 3. TB | 7 | 30-8 | 17 |
| 4. SÍF | 7 | 9-40 | 5 |
| 5. EB/Str. | 5 | 9-26 | 4 |
| 6. B36 | 6 | 8-27 | 2 |